# Hvat goymur seg í

**Har er okkurt løgið við konufólki og taskum. Meðan mannfólkini klára seg við einari mappu í reyvalummanum, og kanska kunnu svinga seg upp á ein kamb eisini, hava vit eina løgna trongd til at dragsa alt møguligt (alneyðugt) skrambul við, bara vit fara ein túr omaneftir í býin.**

**Taskan hjá einari kvinnu fortelur helst fleiri søgur, enn vit geva okkum far um. Tí vóru vit so frekar at spyrja nakrar tilvildarliga valdar kvinnur ein dovnan dag í SMS, um vit kundu lúra í taskurnar hjá teimum.**

*Lagt til rættis: Bjørk H. Olsen og Rigmor Dam*
*Myndir: Bjørk Olsen og Sunva Ey. Lassen*



### "Fólk læna ofta frá mær, tí havi eg alt møguligt við"

**Valborg Hjaltalin Jensen, samskipari, 56 ár**
"Tannbust havi eg altíð við mær, so eg fái bustað tenn, tá ið eg havi etið. Tá ið eg havi bustað tenn, havi eg sminkuna við, so eg fái hampað meg aftan á. Neglaklipparan brúki eg, um neglirnar flosna. Kamburin er við, just in case. Fólk læna ofta ymiskt frá mær, tí havi eg alt møguligt í taskuni – millum annað plástur. Eg fái ofta munnsár, so tí havi eg zovir, og pennar havi eg altíð brúk fyri á arbeiðsplássinum"





*Lekkur Nova taska í ljósum leðri fyri 999 kr. frá Items í SMS.*
*Feit Gabor taska í myrkum leðri fyri 2.700 kr. frá Fótbúna*
*Taska við pelsi fyri 359 kr. frá Fótbúna*
*Nina taska fyri 299 kr. frá Fótbúna*



### "Omma mín lesur altíð vikubløð, so eg keypti henni eitt"

**Joan Varming, lesandi, 22 ár**
"Eg fór til arbeiðis í jakka, men tað varð alt ov heitt, so hann fór niður í taskuna. Eg var í býnum um vikuskiftið, og fyri at fáa luktin burtur, tyggi eg tyggigummi. Omma mín lesur altíð vikubløð, so av tí at eg var í býnum, keypti eg henni eitt"

